gult cyan magenta svart

Føroyahúsi› í Keypmannahavn í summarfrí

Eftir gó›an jóansøkudans vi› Revival sum endabrestin á eini hendingaríkari várskrá letur Føroyahúsi› aftur og fer í summarfrí fram móti ólavsøku.

Kaffistovan í Føroyahúsinum ver›ur stongd frá 1. juli til 23. juli. Fyrstu vikuna av juli ver›ur vaska› upp og ni›ur, mála› o. a.. Si›ani ver›ur fari› í summarfrí. 24. juli letur kaffistovan uppaftur og tá ver›ur gjørt klárt til ólavsøkuna 28. og 29. juli, tá i› fitt av fólki plagar at koma inn á gólvi›, uppl‡sir lei›arin Martin Fjallstein.

Um summari› er minni virksemi í húsinum enn vetrarhálvuna. Fólk eru farin at fer›ast, onnur lesa til próvtøku ella eru meira uttandura. Tó eydna›ist at enda vári› vi› fullsettum húsi› til jóansøkudansin, har teir væl umtóktu su›ringarnir í Revival spældu. Hesin bólkurin hevur fingi› sera gó›a undirtøku seinastu árini.

Mi›skei›is í juni var› skipa› fyri útfer› til eitt anna› føroyskt hús. Ta› eru tey gomlu húsini av Múla, sum standa á Frilandsmuseet nor›an fyri Lyngby. Arni Thorsteinsson, sum arbei›ir á sta›num, greiddi fer›ali›num frá húsunum og gjørdi vart vi› tey serligu ey›kennini, sum eru í slíkum húsum. Lei›arin á Frilandsmusset gav sær stundir at fylgjast vi›, so løtan hendan seinnapartin í roykstovuni í "Har Frammi" av Múla var bæ›i gó› og forvitnislig.

Ta› fer ikki at bera til at siga frá øllum tiltøkunum í vár, men eini tvey tr‡ onnur tiltøk kunna vera nevnd. Eitt var ta› framúr væl eydna›a tiltaki› "William Heinesen 100 ár". Hópin av fólki og eini átta frásøgufólk, sum l‡stu William og virki hansara. Fyrst í februar måna› skipa›i Nærvarpi› fyri dansi tvey kvøld vi› "Teimum av Kamarinum". Ta› var mest sum ov miki› vi› fólki bæ›i kvøldini og lagi› av tí allar besta, me›an tey hálvtri›jahundra› fólkini tralla›u og sungu vi› "Kamarinum". Nærvarpi› ætla›i sær at fáa so miki› burturúr, at ka›alsamband fekst vi› húsi›. Ta› eydna›ist til fulnar. Sí›ani apríl hava tey kunna sent beinlei›is úr húsinum. Vínveitslan 1. apríl var eisini betur manna› enn nakrantí›. Ein slík veitsla er hvørt hálvár. Harafturímóti var hugurin til at spæla bingo linari í vár enn á›ur. Og eitt skei›, sum var lagt til rættis vi› knívsmí› og matger› fekk púrt onga undirtøku.

Hvørt t‡skvøld er døgver›i vi› føroyskum mati, sum fólk kunna tekna seg til. Undirtøkan er rímuliga gó› og altí› best ta› sí›sta kvøldi›. Hvussu ver›ur vi› hesum eftir summarfrítí›ina er sera ivasamt, tí donsku myndugleikarnir for›a nú innflutningi av føroyskum fiskavørum av hesum slag. — Men roynt ver›ur at finna loysn á hesum, uppl‡sir Martin, sum hevur roynt at fáa føroyskar myndugleikar at loysa máli›. Kortini er einki frætt ha›ani enn.

Fleiri hava áhuga at hava rundan fø›ingardag, brúdleyp ella okkurt slag av veitslu í húsinum, sum er sera vælegna› til slík tiltøk upp til eini 140 fólk. Í var og í summar hava tí veri› fleiri slík í húsinum, har fólk koma til búgvi› bor› og veitsluskr‡dd høli. Annan hvítusunnudag høvdu føroysku rennararnir um Oyrasund bi›i› sær innivist til morgunmat og døgver›a um kvøldi›. — Vit hava ikki gjørt naka› vi› ta›, men slík føroysk fer›aløg eru altí› væl komin at spyrja seg fyri. Umstø›urnar at hava fundir vi› mati eru eisini gó›ar hjá okkum, sigur lei›arin

Leingi er ta› sum væl skal vera. Endiliga ver›ur sí›sta hond løgd á gar›in og øki› framman fyri Føroyahúsi›. Á ólavsøku 1997 var› Sagabiografurin sprongdur í luftina. Sí›ani hevur veri› grivi›, drena› og bygt uttan um húsi›. Hetta hevur mangan veri› til nógvan ampa. Serstakliga hesi tvey sí›stu tvey árini, tá i› arbeitt hevur veri› í gar›inum millum húsini. Men hesa vikuna ver›ur steinsett aftur. - Ta› er hugaligt at vita sær, sigur lei›arin, at vit nú hava eini "Føroyahúsi›", sum eru snøgg innan og standa í einum snøggum og hugnaligum umhvørvi. Tó ver›ur einki gjørt vi› gar›in sunnan fyri húsini, aftanfyri sum onkur sigur, fyrr enn seinni. Ta› er bara at fegnast um, at okkara gestir hava veri› so tolnir alla hesa tí›, me›an mold og eyrur, stillagur og byggitilfar hevur ligi› hvørt um anna› á veg inn til húsi›. Tøkk veri øllum fyri ta›.

Nærvarpi›, MFS og kaffistovan í Føroyahúsinum eru stongd frá 1. juli. Rá›gevingin, ssum er í summarfrí, byrjar aftur 14. juli. Øll feløgini í húsinum hvíla eisini eini tveir — tríggjar måna›ir hvørt summar.

Føroyahúsi› bjó›ar øllum, sum hava høvi, at koma inn á gólvi› um ólavsøkuna ella eftir 24. juli. Ólavsøkuskráin er ikki l‡st enn. Men kaffistovan er opin gerandisdagar kl. 16 — 19. frá 1. septembur ver›ur kaffistovan opin frá kl. 14 — 19. Er onkur í iva, ber til at fara inn á heimasí›una hjá Føroyahúsinum. Fyri stuttum er heimasí›an broytt og ver›ur útbygt so hvørt stundir eru. Ta› er bara at minnast navni› á enskum: www.faroehouse.dk..

Føroyahúsi› ynskir øllum vi›skiftafólki, gestum og landsmonnum gott summar.

Føroyahúsi› í Keypmannahavn, nú fasadan er li›ug.Frammanundan vóru húsini hvít, nú eru tey dimmblá vi› hvítum vindeygum.

Gomlu føroysku húsini "Har frammi" av Múla, sum standa á Frilandsmuseet.

Fiskivinnuútbúgving gevur positiv úrslit

Hetta seg›i Marita Rasmussen, samskipari hjá Ráfiskakeyparafelagnum, m.a. í rø›u síni til næmingarnar, sum hava tiki› hægri útbúgving í fiskivinnu (HIF) á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna í summar

Gó›u HIF-arar, næmingar og øll tit, sum eru komin saman her í dag at hei›ra teimum, sum fáa prógv — Hjartaliga tillukku. Eg minnist væl, tá eg sjálv fekk prógv frá mi›námsskúla. Hátí›arliga løtan, i› vit høvdu bí›a› eftir og sæ› fram ímóti seinastu árini.

Tit hava nú seinastu tr‡ árini gjørt tykkum klár til stórar avbjó›ingar. Summi tykkara hava kanska longu tiki› avger› um at fara beinlei›is út at arbei›a í vinnuni, me›an onnur tykkara fara ella umhugsa at fara ví›ari til hægri lesna›. Hvat tit enn velja, so eru avbjó›ingarnar stórar, tí framtí›arútlitini í okkara høvu›svinnum, bæ›i fiski - og alivinnuni, seta stór krøv til teirra, i› hava áræ›i at taka lut í einari mi›vísari menning innan framlei›slu og gransking. Henda gongdin er ney›ug, skal føroysk fiski- og alivinna ver›a kappingarfør.

Í hesum tí›um, tá tosi› um føroyskt fullveldi er í hæddini, ivist eg ikki í, at eisini tit hugsa um tykkara framtí›, og um hvør tykkara leiklutur ver›ur í framtí›ar Føroyum. Føroyska samfelagi› er í dag eitt samfelag vi› lítlum arbei›sloysi, og møguleikarnir fyri at nema sær hægri útbúgving í Føroyum og uttanlands eru gó›ir.

Búskaparliga gongdin í høvu›svinnuni seinastu árini hevur veri› gó›. Útflutningsvir›i› á fiskavørum er økt, sjálvt um samla›a nøgdin, sum er virka›, er farin naka› ni›ur. Í alivinnuni er gongdin sera positiv. Føroyska alivinnan hevur tvífalda› framlei›slunøgdina, og laksaprísirnir hava seinasta hálva ári› veri› methøgir.

Hvørjar eru avbjó›ingarnar?

Seinastu árini hava vit sæ›, at føroyski fiskiídna›urin hevur ment seg til eina kappingarføra vinnu. Rávøruprísurin á flestu fiskasløgum er hægri í Føroyum enn á útlendsku fiskamarkna›unum, og er hetta eitt tekin uppá, at føroyska vinnan í framlei›su- og søluli›num hevur ein struktur, sum stimbrar kappingarføri›. Orsøkin til hesa positivu gongd er m.a., at í føroysku fiskivinnuni í dag arbei›a fleiri útbúgvin fólk enn nakrantí›, og uttan iva finna tit, sum fáa prógv her í dag, eisini tykkara pláss í vinnuni og ver›a vi› til at taka tær avbjó›ingar, sum liggja fyri framman.

Hyggja vit at tilgongdini til fiskastovnarnar, so er hendan ymisk ár undan ári, og føroyska vinnan má duga at tillaga seg knappligar broytingar í atgongdini eftir rávøru. Virkir mugu skjótt kunna leggja framlei›sluna um, eftir hvørjum tørvur nú er á, fyri at viga upp fyri náttúrufyribrigdunum.

Somulei›is má føroyska fiski- og alivinnan leggja seg eftir at virka hávir›isvørur, og rávøran má n‡tast betri, solei›is at størri partur av tilfeinginum ver›ur gagnn‡ttur í framlei›sluni. Hetta kann gerast vi› at menna a›rar framlei›slur burturúr tí partinum av fiskinum, sum í dag mangan hevur lægsta vir›i›, og sum í nógvum førum er ein trupulleiki og ein eyka kostna›ur hjá vinnuni. Framvegis í dag ver›ur stórur partur av fiskinum ikki gagnn‡ttur á besta hátt ella als ikki gagnn‡ttur. Fyrr enn vit eru komin so langt, at alt, ta› veri seg høvd, garnar, livur og allur avskur›ur annars, ver›ur virka›, eru vit ikki komin á mál. Her liggja stórar og sera vitanar- og fíggjarliga krevjandi íløgur fyri framman, men ver›ur rætt atbori›, eru stórir møguleikar innan hetta øki.

Framvegis er ta› eisini solei›is, at ein ov stórur partur av okkara fiski og alifiski fer óvi›gjørdur av landinum. Vit eiga sjálvsagt at seta okkum sum mál, at ein so stórur partur av fiskinum ver›ur li›ugt vi›gjørdur til brúkarar á meginlandinum her í Føroyum, væl at merkja, um pengar eru í tí.

Í framtí›ini hevur ta› eisini stóran t‡dning at leggja dent á gó›skust‡ring. Gó›skust‡ringin skal tryggja, at tær vørur, i› ver›a virka›ar, hava ta gó›sku, keyparin væntar, og ver›a virka›ar undir tryggum umstø›um, solei›is at heilsan hjá brúkarunum ikki kemur í vanda.

Automatisering av arbei›um á virkjunum ver›ur væntandi ein gongd, sum ikki slepst undan. Arbei›i› á fiska- og kryvjivirkjum er mangan tungt og einshátta›, og n‡ggj tøkni kemur alt meira inn á virkini og vil í framtí›ini avloysa tunga arbei›i› í vinnuni.

Fiskivinnan fer at kappast vi› eina komandi oljuvinnu um arbei›smegina og hetta ver›ur ein av stóru avbjó›ingunum, føroyska fiskivinnan hevur í framtí›ini.

Jú, víst er oljuvinnan spennandi, men oljan er eitt avmarka› tilfeingi, sum fyrr ella seinni fer at ganga undan. Fiskivinnan og alivinnan eru hinvegin vinnur, sum arbei›a vi› tilfeingi, sum endurn‡ggjar seg sjálvt. Ver›ur rætt fari› fram og duga vit at heysta burtur úr náttúruni á ein skynsaman hátt og annars at gagnn‡ta umhvørvi okkara skilagott, hava hesar vinnur stórar møguleikar.

Innan hesar vinnur skulu tit virka og vera vi› til at skipa fyri.

At enda vil eg lesa fyri tykkum yrkingina Barni›, bergi› og blómurnar. Karsten Hoydal hevur yrkt:

Vilt tú finna blómurnar,
eingin annar eigur,
gakk so djarvur huga tíns
brøttu bjargalei›ir.

Klívur tú og klintrast tú
allar lei›ir finnur,
upp og ni›ur inn og út
størri fong tú finnur.

Men, barn mítt, um blómur
tú
vilt vinna eingin eigur,
mást tú klúgva huga tíns
brøttu bjargalei›ir.

Einafer› enn tillukku øll somul.

Marita Rasmussen

HIF næmingar, i› hava loki› prógv á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna í summar

ÚTSØLA
Á LOFTINUM
við nógvum góðum tilboðum!
Í hesum sambandi
lata vit alt frá
ULDAHL til ÷20%
Eisini hava vit:
• Undirklæðir frá C.C.D.K.
• Leðurjakkar/frakkar frá
AÚLÚNA
MILLENNIUM
Vágsbotnur
P.O. Box 3166
110 Tórshavn
Tel 318080
Fartel. 221314
Fax 317782
Sosialurin - 311820